Faroe Offshore Service P/F

Umhørvis- og vinnumálaráðið
Postboks 377
110 Tórshavn

B20201001 UVMR hoyring ALS-lógin
Skáli, hin 01.10.2020

Viðv.: "Uppskot til broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing"

Vísandi til t-post tykkara frá 24. september, har omanfyri nevnda uppskot verður sent til hoyringar hjá Faroe Offshore Service P/F.

Faroe Offshore Service P/F hevur niðanfyristandandi viðmerkingar:

Ein reyður tráður í hesum uppskotinum er ein avgerð í Føroya Rætti frá 15. mai 2017 í einum rættarmáli millum Faroe Offshore Service P/F og ALS.

Høvuðsniðurstøðan í dóminum er, at ALS hevur bert heimild at krevja ALS-gjald av A-inntøku. Tað var eisini tað sum málið snúði seg um. Tískil eru viðmerkingar okkara serliga til broytingarnar á hesum økinum.

Gjaldsskyldan verður i hesum uppskotinum løgd í 2 greinar. Talan er um § 7, sum staðfestir gjaldsskyldu, har víst verður til § 2 um, hvørjum gjaldast skal av.

Viðmerkingar okkara taka tí støði í ásetingunum í § 2 og serliga tað, sum var viðkomandi fyri dómin, tað er § 2, nr. 1

Uppskot til broyting av § 2 í ALS-lógini sær út til at hava til endamáls at geva ALS heimild at krevja ALS-gjald av inntøkum, sum ikki er A-inntøka.

Í § 2, nr. 1, litra b verður heimild givin at krevja gjald av lønarinntøku, sum ikki er A-inntøka, fyri arbeiði, útint í Føroyum, meðan í litra c verður givin heimild at krevja gjald frá lønarinntøku, sum ikki er A-inntøka, fyri arbeiði, útint í Norðurlandi, og sum sbrt. ásetingum í millumtjóðasáttmála eru sosialt tryggjað í Føroyum.

Vit síggja fleiri vansar við hesum uppskotinum.

Uppskotið leggur upp til 2 nýggj inntøkuhugtøk:

1. Lønarinntøku, sum ikki er A-inntøka, fyri arbeiði, útint í Føroyum og
2. Lønarinntøku, sum ikki er A-inntøka, fyri arbeiði, útint í Norðurlandi, og sum sbrt. ásetingum í millumtjóðasáttmála eru sosialt tryggjað í Føroyum.

Vit saknað eina nágreining av hvat lønarinntøka er. Í viðmerkingunum er nevnt:

"Tað kann tó koma fyri, at persónar forvinna lønarinntøku fyri útint arbeiði í Føroyum, uttan at arbeiðsgevarin hevur skyldu at rinda inntøkuna sum A-inntøku, av tí at arbeiðsgevarin hvørki hevur heimating ella fastan rakstrarstað í Føroyum. Við nýggju ásetingini verður tryggjað, at gjøld til Arbeiðsloysisskipanina verða rindað av øllum lønarinntøkum fyri arbeiði útint í Føroyum. Hetta er galdandi óansæð, um løntakarin er búsitandi í Føroyum ella aðrastaðni."

Her verður lagt upp til, at útlendskur løntakari, sum gerð eitt arbeiði í Føroyum fyri útlendskan arbeiðsgevara, hevur gjaldsskyldu til ALS.

Hendan ásetingin fer helst at vísa seg sera trupul at umsita, sum dømi kann nevnast:

Um ein útlendingur arbeiðir í Føroyum fyri útlendskan arbeiðsgevara, sum ikki hevur fast rakstrarstað í Føroyum, hava bæði útlendski løntakarin og útlendski arbeiðsgevarin, eftir hesi áseting gjaldsskyldu til ALS. Í dóminum er talan um inntøku, sum ikki er skattskyldug til Føroyar og tí ikki skal uppgevast til føroyskar myndugleikar. Hvussu skal ALS fáa hendur á hesum upplýsingum? Og hvørja heimild hevur ALS, at krevja gjøld frá persónum, sum hvørki hava bústað í Føroyum ella skattskyldu til Føroyar?

Nevnt verður eisini í viðmerkingunum, at arbeiði um borð á føroyskum skipum er at meta sum arbeiði í Føroyum. Kann tað hugsast at lønarinntøka fyri viðlíkahaldsarbeiði umborð á føroyskum skipi sum liggur á skipasmiðju í td. Singapore er gjaldskyldug til ALS skipanina í Føroyum?

Hvussu er við fríum ágóðum, eitt nú fríur bilur, ravmagn ella olja? Tað er einki at ivast í, at fríir ágóðar eru ein partur av lønini hjá løntakarum, men er hetta ein lønarinntøka?

Sum tað framgongur omanfyri so er hugtakið "lønarinntøka, sum ikki er A-inntøka", eitt rættuliga óneyvt hugtak. "A-inntøka" og "skattskylduga inntøka" eru harafturímóti meiri hondføst hugtøk.

Tað hevði tí verið nærliggjandi at hugt eftir kenda og roynda hugtakinum "skattskyldug inntøka". Eitt nú er hetta hugtakið brúkt í sambandi við gjaldskyldu til AMEG og Heilsutrygd.

Útgangsstøði hevði tá verið, at gjaldast skal til sosialu skipanirnar í Føroyum av allari inntøku, sum er skattskyldug til Føroyar. Eisini er hetta eitt hugtak sum TAKS í dag krevur gjøld inn eftir. Hetta eigur alt annað líka at vera umsitingarliga lættari.

Og um man samstundis tekur ásetingarnar í lm 107/2016 um undantak fyri gjaldsskyldu við, so verður tað upp til einstaka løntakarar at gera vart við, um viðkomandi er fevndur av sosialari skipan í millumlanda sáttmála, og harvið ikki eisini skal gjalda í Føroyum.

Ásetingin var í uppskotinum í §1, nr. 2:

Persónar, sum eru fevndir av stk. 1, men sum rinda heilsutrygdargjald í øðrum Norðanlandi vísandi til "Nordisk konvention om social sikring", kunnu eftir umsókn verða undantiknir gjaldskyldu.

Eisini skulu vit vísa á, at viðgerðartíð fyri frítøkur, er sera long.

Í sambandi við rættarmálið vóru framlagdar 142 frítøkur fyri løntakarar, sum høvdu arbeitt í Norra. Ímillum hesar frítøkur var vanligt, at viðgerartíðin var uml. 2 ár, men í einstøkum førum heilt upptil 5 ár. Av tí, at talan er um viðger hjá norskum myndugleikum, hava føroyskir myndugleikar onga ávirkan á viðgerðatíðina.

Við fyriliggjandi uppskoti verður lagt upp til eina øking í umsiting og eftirliti av frítøkum. Ábyrgdarbýtið av frítøkunum er í besta falli ógreitt. Fleiri stovnar umsita partar av konventiónini. Í øllum førum er talan um ALS, Almannaverkið, helst eisini AMEG, Barsilskipanin og Heilsutrygd, møguliga aðrar stovnar við.

Almannaverkið hevur samskifti við løntakara og NAV, men eingin av stovnunum hevur yvirskipaðu ábyrgdina og eftirlit av frítøkum eftir konventiónini.

Í § 7, stk. 1, nr. 2 er ásett at tey sum rinda inntøkur, sum er nevndar í §2, nr. 1 skulu gjalda til skipanina. Her kundu vit hugsa okkum at tað bleiv nágreina hvat meinast við "rindar" er talan um arbeiðsgevara ella hvat?

Viðmerkingarnar bæði í avsnit 2.3 og serligu viðmerkingarnar til § 7, stk. 1, nr. 2 leggja upp til at talan er um arbeiðsgevara.

Í avsnit 2.3 í viðmerkingunum framgongur at skyldan at gjalda áliggur bæði persóninum sjálvum og arbeiðsgevara hansara – eisini um talan er um útlendskan arbeiðsgevara. Vit kundu hugsa okkum at vita hvussu ALS ætlar at umsita innkrevjing frá útlendskum arbeiðsgevarum av inntøkum sum ikki vera goldnar um føroysku A-skattaskipanina. Sí eisini viðmerkingarnar omanfyri.

Vit hava fyrr spurt ALS, hvussu innkrevjing frá útlendskum arbeiðsgevara fer fram, uttan at fáa svar.

Vísast kann á, at hetta er ikki ein nýggj støða. ALS hevur allatíðina hildi fast í at arbeiðsgevarin eisini skal gjalda.

Í viðmerkingunum til § 2 , nr 1 framgongur at avtalur eru gjørdar við NAV í Norra um at undantaka tríggjar bólkar av løntakarum. Í tveimum av hesum avtalunum framgongur týðuliga at talan er um Norskan arbeiðsgevara, navnliga føroyskar fiskimenn á norskum fiskiskipum og føroysk sjófólk á norskum seismikk- og supplyskipum. Hesar avtalur eru frá ávikavist desember 1999 og august 2006.

Okkum vitandi eru hesir útlendsku arbeiðsgevarar ongantíð kravdir eftir ALS-gjøldum.

Um ætlanin bert at krevja útlendska arbeiðsgevaran, í teimum førum umboðsmaður/millummaður hevur heimting í Føroyum, verður gjørdur mismunur á arbeiðsgevarum sum hava umboð í Føroyum og teimum sum ikki hava umboð í Føroyum. Arbeiðsgevarar sum hava umboð í Føroyum vera verri stillaðir.

Aðrar viðmerkingar:

Hetta uppskoti er á hesum økinum meinlíkt løgtingsmál nr. 64 frá 2018.

Viðmerkingar okkara eru tí eisini í høvðusheitum tær somu sum tá.

Í tí málinum var Faroe Offshore Service innkallað í Rættarnevndina. Rættarnevndin spurdi tá um tað var møguligt at fáa avrit av tilfarinum sum Faroe Offshore Service P/F (FOS) hevði við á fundin.

Vit hava viðlagt tað tilfarið eisini, Talan er um:

- Skriv til Rættarnenvdina
- Tíðarlinja fyri arbeiði hjá FOS í sb. við gjald til ALS og BAS (fram til stevning)
- Framløga fyri SMR
- Frítøku avtalur við millum AV og NAV
- Dómin, sum víst verður til í broytingaruppskotinum.
- Kæruavgerð um sjálvbodna trygging
- Afturkalling av frítøku.
- Upprit frá GrannskoðaraStovuni.

Eru spurningar ella ivamál, eru tit sjálvandi altíð vælkomin at ringja, t-posta ella støkka inn á gólvið.

Við heilsan

Hans Jákup Johannesen

Faroe Offshore Service P/F
Møttisgil 4
480 Skáli

Tlf: 442 000
t-post: fos@faroeoffshore.com